# Spennandi samstarv um sildina

**Í morgun skrivaðu Kollafjørð Pelagic og Taabbel Fiskeeksport í Skagen undir eina avtalu, sum fer at økja virksemið hjá fyritøkunum munandi. Talan er í fyrstu atløgu um munadygt, norðurlendskt sildasamstarv, sum røkkur frá bryggjukantinum í Norðuratlantshavi heilt niður á evropeiska marknaðin. Samstarvið kann gerast enn tættari í framtíðini.**

SAMSTARV
*Snorri Brend*



*Teir hava júst undirskrivað sáttmálan um samstarv – vm. Dánjal Jákup Andreasen, virkisleiðari, Sverri Hansen, nevndarformaður og Viggo Gjødesen Mikkelsen, stjóri og eigari í Taabbel Fiskeeksport*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Kollafjørður:** Samstarvsavtalan, sum Kollfjørð Pelagic og Taabbel Fiskeeksport, er ein avtala, ið samansjóðar tvær fyritøkur, sum virka á tveimum týdningarmiklum økjum í norðurlendskum fiskiídnaði.

Avtalan, sum í fyrstu atløgu fevnir um fryst sildafløk á evropeiska marknaðin, fer at gagna virkjunum, sildaskipunum og evropeiska matvørumarknaðinum sum heild.

Kollafjørð Pelagic, sum higartil hevur fryst heila, runda sild, roynir við samstarvinum at styrkja felagið og at fáa fleiri sildaskip at landa til stóra virkið í Kollafirði.

Felagið valdi at samstarva við Taabbel Fiskeeksport, tí virkið í Skagen hevur drúgvar royndir í at skera flak. Umframt hetta hevur felagið eisini eitt munagott sølunet um alt Evropa.

Samstarvið hevur við sær, at Kollafjørð Pelagic nú eisini fer at senda fryst sildafløk á evropeiska marknaðin. Talan verður eisini um at góðska sildina á annan hátt.

### Tvífalda rávørunøgdina

Nevndarformaðurin í Kollafjørð Pelagic fegnast um samstarvsavtaluna.

Sverri Hansen sigur, at samstarvið fer uttan iva at bera við sær, at tað verður lættari hjá skipunum at sleppa av við sildina undir støðugum viðurskiftum.

- Nú kunnu vit bjóða teimum stóru, nútímans skipunum, sum tøkniliga eru sera væl útgjørd, eitt gott landingarstað. Kollafjørð Pelagic kann tryggja teimum høga góðsku til ein umfatandi matvørumarknað umvegis netverkið hjá Taabbel Fiskeeksport.

- Vit vænta at tvífalda rávørunøgdina til okkara virki, sigur Sverri Hansen, nevndarformaður í Kollafjørð Pelagic.

### Tættari samstarv

V.G. Mikkelsen, sum stjórnar og eigur Taabbel Fiskeeksport sær eisini stórar møguleikar í samstarvinum.

- Nú kunnu vit lata frystan fisk til matna á tann stóra evropeiska marknaðin. Tað hevur ikki verið møguligt áður. Harumframt fáa vit nú møguleikan at vinna marknaðarpartar aftur, sum vit mistu, tá ið norðmenn bannaðu sínum skipum at landa norðhavssild á danska marknaðin og í øðrum ES-londum, sigur V.G. Mikkelsen.

Kollafjørð Pelagic og Taabbel Fiskeeksport vísa á, at samstarvsavtalan er eitt ítøkiligt dømi um norðurlendskt samarbeiði í tí áhaldandi alheimsgerðini.

Avtalan millum virkini letur eisini upp fyri møguleikanum at knýta fyritøkurnar uppaftur tættari saman, og tað kann koma upp á tal, at Taabbel Fiskeeksport fer at keypa partabrøv í Kollafjørð Pelagic.

### Skera og frysta

Kollafjørð Pelagic kann frysta 400 tons um samdøgrið, og samstarvið við Taabbel Fiskeeksport ber við sær, at virkið í Kollafirði verður ført fyri at skera og frysta 270 tons av norðhavssild um samdøgrið í eitt longri tíðarskeið. Harvið fæst sum mest burtur úr sildini til matna.

Starvsfólk hjá Taabbel Fiskeeksport hava havt ábyrgdina av at seta upp flakamaskinur á føroyska virkinum.

# Eingin skúlagongd vegna umfatandi herverk

**Í dag hevur eingin skúlagongd verið í Felagsskúlanum á Oyrarbakki. Orsøkin er eitt herverk, sum er framt av fólki ið hava brotið seg inn í skúlan. Enn er ikki greitt um tað eru næmingar við skúlan ella onnur, sum hava framt hetta umfatandi herverkið**

HERVERK
*Snorri Brend*

**Oyrarbakki:** Tað er ikki gott at vita, hvat tann ella tey hava hugsað fyri sær, tá tey náttina til sunnudagin brutu sær veg inn í Felagsskúlan á Oyrarbakka.

Í øllum førum hava viðkomandi framt eitt rættiliga umfatandi herverk á skúlan.

Teir hava brotið sær veg inn í skúlan gjøgnum ein rút, og hava síðani tipt vaskini og koyrt kranarnar á fult.

Úrslitið gjørdist so tað, at eingin skúlagongd var í dag. Men í morgin verður aftur farið í skúla sum vanligt.

Løgreglan er í dag á staðnum og kannar um herverksfólkið hevur latið onkur spor eftir seg.

### Heitt og kalt vatn

Tað hevur regnað illa um vikuskiftið, men tað vóru kortini aðrar nøgdir av vatni sum møttu teimum, ið komu í felagsskúlan um vikuskiftið.

Í ovaru síðu á skúlanum hevur onkur brotið ein rút og er síðani farin á rundferð til vaskini í skúlanum.

Her hava viðkomandi fyrst fylt frárenslini við wc-pappíri og hava síðani skrúvað bæði teir køldu og heitu kranarnar frá.

Tann fyrsti sum síðani kom til skúlan kundi bara staðfesta, at her var stórur vatnskaði hendur á gólvini í ovaru hæddini og í kjallaranum.

- Her var einki annað at gera enn at avlýsa skúlagongdina í dag, sigur skúlastjórin, Jón Ingi Ejdesgaard við Sosialin.

Í morgin verður kortini farið aftur í skúla sum vanligt.

### Eingin illgruni enn

Av Politistøðini í Runavík verður upplýst, at ein løgreglumaður hevur verið á staðnum í dag, saman við umboðnum fyri eitt nú tryggingina.

- Vit hava ikki illgruna til nakran enn, og tí vita vit heldur ikki, um tað eru næmingar ella aðrir persónar, sum hava framt hetta herverkið, verður upplýst hagani.

Ein av uppgávunum hjá løgreglumanninum, sum í dag er á felagsskúlanum er júst at fáa nærri greiðu á hesum spurninginum.

Staðfestast kann tó kortini, at tann ella teir sum hava framt hetta herverkið, hava ætlað sær inn í skúlan rættiliga ósæddir.

Hetta sæst best av at tann brotni rúturin lá í ovaru síðu av skúlanum, burtur frá fólki og burtur frá alfaravegi.



*Felagsskúlin á Oyrarbakka var stongdur í dag, tí herverk er framt á skúlan*